# Tannáringar gjørt føroyskt sjampo

**Tað byrjaði sum eitt veruleikafjart hugskot, men við eini trúgv uppá egin evnir og einum øgiligum ágrýtni, eydnaðist tað teimum at fáa fyrsta føroyska sjampoið nakrantíð út á handilshillarnar**

UNGT VIRKI
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*



*Stjórin á Kemilux, Debes Petersen, saman við fólkunum aftan fyri Fríska, Sverre T. Johannesen, Maria Neshamar og Bogi Berg*

Tað eru tey trý Bogi Berg, Maria Neshamar og Sverre T. Johannesen, sum eru høvdini aftanfyri sjampoið Fríska. 19 ára gamli Bogi er stjóri og framleiðslustjóri. Maria er marknaðarleiðari og Sverre fíggjarstjóri. Men áðrenn tey kundu kalla seg hetta, vóru tey einans tríggir tilvildarligir næmingar á handilsskúlanum, sum høvdu valt sær lærugreinina Ungt virki.

Í stuttum snýr lærugreinin seg um at framleiða eina vøru og reka eitt virki, og her skulu vit skunda okkum at leggja aftrat, at tað eru tey allarfægstu, sum koma so mikið langt, at tey seta vøruna í framleiðslu.

Tað hava Bogi, Maria og Sverre megnað við Fríska. Sjampoið kann í dag keypast í Bónus fyri 29,95 kr. Men aftanfyri liggur ein rúgva av fyrireikingum, kanningum og arbeiði.

## Ikki bara sum at siga tað

Tey trý hava gjørt marknaðarkanningar, buisness plan, framløgur og hildið fyrilestrar. Arbeiði aftanfyri Frísku kann ikki mátast í tímum ella døgum, men heldur vikum og mánaðum.

Og tað hevur langt frá verið líka lætt alla tíðina. Tað, sum tey hildu tók eina viku tók tríggjar vikur, og tað sum átti at tikið ein mánað tók tríggjar mánaðir. Men bólkurin hevði frá fyrsta degi av avtalað, at tey mugu halda saman og trúgva uppá seg sjálvi. Og hetta gjørdu tey allan vegin ígjøgnum, eisini tá tey stóðu og vóru um at missa móti, tí einasta tilboðið tey fingu til at framleiða 3000 etikettir til dunkarnar, ljóðaði uppá 35.000 kr.

Men so var tað, at ein fyritøka bjóðaði seg fram at framleiða etikettirnar heilt ókeypis, so var aftur ljós fyri framman. Soleiðis hevur virksemið hjá bólkinum verið. Tað hevur verið upp og niður, og gleðin hevur verið stór men tey hava sanniliga eisini verið vónsvikin.

## Fingu serliga viðursløn í Danmark

Fríska vann Ungt virki-kappingina í Føroyum, har fleiri onnur sera góð hugskot vóru. Í vár vóru tey so niðri í Danmark til Ungt virki-kappingina har, og eisini har fingu tey sera góð skotsmál, og fingu tey eina virðisløn fyri at vera tað virkið í kappingini, sum hevði selt mest av síni vøru.

## Heilsaðu uppá prinsessu Alexandru

Á hesi kapping niðri í Danmark høvdu øll virkini hvør sín bás, og har var ein rúgva av stuttligum vørum. Millum annað var onkur, sum hevði ment ein pitabreyðshaldara – eitt slag av einum stativi til pitabreyðið at vera í, soleiðis at tað kundi standa loddrætt og øll fyllan ikki koppaði úr, tá tú leggur tað frá tær.

Tey trý Bogi, Maria og Sverre gingu runt og hugdu at hinum básunum, og eisini vóru sera nógv og hugdu at teirra bási. Millum annað prinsessa Alexandra var og heilsaði uppá hjá teimum, og hetta er nakað tey trý halda vera rættiliga stuttligt.

## Heimsins besta sjampo

Tá tað nú er eydnast teimum trimum ungu næmingunum at fáa fyrsta føroyska sjampoið á hillarnar, so skuldi ein trú, at tey vóru nøgd. Men tey gevast ikki her, tí Fríska er eitt so mikið gott produkt, at tey ikki smæðast fyri at kalla tað heimsins besta sjampo. Ætlanin er í fyrsta umfari at leggja ein fjórðing av føroyska marknaðinum undir seg, og framtíðarætlanin er, at Fríska skal standa fyri meiri enn helminginum, av allari sjamposølu í Føroyum.



*Prinsessa Alexandra var og hugdi at bási teirra í Danmark*

---

Hans Fróði Hansen roynir seg sum rithøvund:

# – Ein bók til allar kvinnur

**Í næstum kemur Hans Fróði Hansen út á altjóða marknaðin við eini nýggjari bók, hann sjálvur hevur skrivað. Hetta er fyrstu ferð Hans Fróði roynir seg sum rithøvundur, men fleiri bøkur eru ávegis. – Bókin er ætlað øllum kvinnum í heiminum – óansæð støðd, aldur og húðarlit, sigur Hans Fróði Hansen**

NÝGGJ BÓK
*Lív Højsted Horsdal*
*horsdal@sosialurin.fo*




*– Tað er so nógv, vit ynskja at broyta og bøta um í lívinum: húsið, garðin, bilin, arbeiðið o.s.fr., men hví ikki byrja við at broyta okkum sjálvi og gerast tann persónurin, vit altíð hava viljað verið? Í bókini hjá mær ber til stig fyri stig at broyta seg sjálvan rætta vegin – bæði innan og uttan, sigur Hans Fróði Hansen*

Bókin er á enskum og ber heitið »Image & Fashion Secrets for Every Woman«. Hon er løtt at lesa og prýdd við nógvum myndum og orðatøkum, Hans Fróði hevur smíðað. Rithøvundurin hevur fingið íblástur til at gera bókina frá kvinnum, hann hevur hitt allastaðni kring knøttin:

– Eg elski at arbeiða við kvinnum og hjálpa teimum at finna teirra egna stíl. Eg havi skrivað bókina á enskum, tí allar kvinnur í heiminum hava brúk fyri henni. Eg arbeiði somuleiðis á altjóða marknaðinum, og bókin verður seld í nógvum londum: Í USA, Onglandi, Danmark. Somuleiðis verður hon at finna í nøkrum handlum í Føroyum. Í løtuni verður bókin týdd til danskt, og eg havi fingið nakrar fyrispurningar úr øðrum londum, ið ynskja at týða hana til annað evropeiskt mál, sigur Hans Fróði Hansen.

## Image & Fashion Consultant

Hans Fróði Hansen hevur, síðan hann var heilt ungur, havt stóran áhuga fyri vakurleika og móta. Eftir at hava roynt nógv ymiskt arbeiði og at verið fótbóltsspælari burturav, valdi Hans Fróði at gera vakurleika og móta til sína yrkisleið. Hann fór til USA og Onglands at læra til Image & Fashion Consultant og hevur síðan tá arbeitt í hesum yrkinum í nógvum londum uttanlands, men tó eisini í Føroyum í eitt tíðarskeið.

## Til allar kvinnur

Høvuðsparturin av bókini eru ráð til uttaru útsjóndina, men eisini eru ráð til tað innara, ið, Hans Fróði metir, er ein stórur partur av heildini.

– Eg havi gjørt bókina fyri at vegleiða kvinnum, hvussu tær møguliga kunnu klæða seg á bestan hátt. Flest allar slíkar vegleiðandi bøkur til kvinnur eru gjørdar av kvinnum ella samkyndum monnum. Men eg eri hvørki ein kvinna ella ein samkyndur maður og kann tískil fáa tað mest feminina fram í eini kvinnu, sigur Hans Fróði Hansen.

Men hvat fær ein mann at gera eina bók, ið bert er ætlað kvinnum?

– Eg havi gjørt bókina við djúpum tokka til kvinnuna og ivist onga løtu í, at allar kvinnur fáa nógv burtur úr bókini. Men somuleiðis havi eg skrivað hana fyri at prógva fyri mær sjálvum, at tað ber til at geva eina bók út á altjóða marknaðin. Henda bókin er bert ein liður í eini røð av fleiri bókum, og minst ein bók kemur út afturat í ár, sigur Hans Fróði at enda.

> *"Eg ætli, bókin skal verða ein handbók hjá øllum kvinnum. Hon er lítil og løtt og tískil góð at hava við í taskuni ella á náttborðinum sum »íblástrarbók«"*
>
> *– Hans Fróði Hansen*